## Pozzato vann fyrsta fjallið



Fyrstu heyggirnir í Tour de France vórðu súkklaðir í gjár. Tað gjørdi, at stóra høvuðsfeltið var væl og virðiliga skorið niður, tá málstrikan nærkaðist, og her vóru tað so einir 20 súkklarar, sum kappaðust um etapusigurin. Á seinastu metrunum eydnaðist italska Filippo Pozzato at stríða seg á oddasessin, og soleiðis klintraði hann upp á triða plássið í samlaðu støðuni, har Cancallara enn er fremstur.

## Tvey mál til málverjan

Albert Sævarðsson, sum eitt skifti vardi málið hjá B68, skeyt bæði málini, tá Njarðvík í íslendsku aðru deild herfyri vann 2-1 á Fjølnir. Albert hevur ofta áður roynt seg sum brotssparksskjútti, og tað gjørdi hann eisini hjá B68 onkra ferðina. Móti Fjølni skoraði hann fyrst til 1-0, og fýra minuttir fyri leiklok var enn eina ferð tryggur úr ellivu metrum, soleiðis at sigurin kundi vissast. Talan var um týdningarmiklan sigur hjá Njarðvík, sum stríðist móti niðurflyting.

## Yvirkærunevndin skal savnast

**Kæran frá Skála um Kaplanovic-málið er enn ikki viðgjørd av nýggju Yvirkærunevndini, sum her fær sítt fyrsta mál at taka støðu til**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn hevur yvirkærunevndin ikki tikið støðu til kæruna, sum Skála sendi víðari, eftir at teir av Aganevndini vórðu dømdir at tapa dystin móti B36. Yvirkærunevndin varð á fyrsta sinni vald á aðalfundinum hjá FSF seinast, og hetta er fyrsta málið, sum er sent nevndini.

- Enn er nevndin ikki skipað. Sjálvur eri eg uttanlands í løtuni, og tí havi eg als ikki sæð málið, men eg eri tó kunnaður um hetta, sigur Jens Erik Magnussen, sum er ein av limunum í nevndini.

Hann sigur, at sjálvur verður hann aftur í Føroyum mánadagin, og at hann tá fer at hyggja at málinum. Nær hetta so verður viðgjørt av nevndini, dugir hann tó ikki at siga.

- Tað er sjálvandi ein trupulleiki, tá feriutíð er, men talan er sjálvandi um eitt mál, sum vit vilja viðgera, so skjótt, sum tað ber okkum til, sigur Jens Erik.

# Fimleikarar á veg til Isle of Man

**Eftir drúgvar venjingar og fyrireikingar eru fimleikararnir nú á veg til Isle of Man at kappast á fimleikaoyggjaleikunum, sum byrja mánadagin 16. juli**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Fyri tveimum árum síðani vóru føroysku fimleikararnir stóru heiðursmerkjahávarnir á oyggjaleikunum í Hetlandi. Fimleikurin var sum kunnugt ikki við á oyggjaleikunum á Rodos í ár, men hóast hetta vera mongu fimleikararnir ikki við sviðusoð.

### Fimleikaoyggjaleikir

Tá ið tað fyri tveimum árum síðani gjørdist greitt, at fimleikur ikki var ein av ítróttargreinunum, sum vóru við á oyggjaleikunum á Rodos 2007, settust fólk ikki hendur í favn. Ymisku fimleikasambondini tosaðu saman, og niðurstøðan var, at fimleikararnir í øllum førum ikki skuldu vera noyddir at bíða heili fýra ár ella uppaftur longri, áðrenn tey fingu høvi at hittast aftur í oyggjaleikahøpi. Tí var avgjørt at skipa fyri serligum fimleikaoyggjaleikum. Upprunaliga var ætlanin, at Føroyar skuldi vera vertur, men tað gjørdist skjótt greitt, at umstøður og karmar ikki náddu at koma upp á pláss til tíðina, og tí tók Isle of Man yvir.

### Góðar umstøður

Tað er ikki so langt síðani, at Isle of Man var vertur fyri oyggjaleikum, og tí var hetta óivað ikki ein so stórur biti hjá teimum at gloypa. Summi av teimum, sum eru í føroyska ferðalagnum, hava áður verið á Isle of Man, og tey lata stak væl at umstøðunum, bæði til venjingar, kappingar og innivist.

### Føroyska ferðalagið

Tilsamans vera 15 fólk í føroyska ferðalagnum. Umframt fimleikarar og venjarar er eisini ein fysioterapeutur og ein ferðaleiðari við. Harafturat eru fleiri foreldur og onnur fimleikaáhugað, sum fara við at stuðla og fylgja kappingunum. Ferðalagið fer til Danmarkar í dag og víðari til Isle of Man leygardagin.

### Góðar vónir

Venjararnir hava góðar vónir til fimleikararnar. Eyvind Akraberg Hansen, landsliðsvenjari hjá monnunum, hevur áður sagt Sosialinum, at seinastu oyggjaleikir vunnu teir eina rúgvu av heiðursmerkjum, og teir ætla sær ikki at seta ferðina niður. Teir ætla sær enntá at skriva føroyska fimleikasøgu og vinna liðkappingina hjá monnunum fyri fyrstu ferð.

Durita Knudsen, landsliðsvenjari hjá kvinnunum, væntar eisini, at kvinnurnar fara at klára seg væl. -Tær hava gjørt stór framstig seinastu tíðina, so nú verður spennandi at vita, hvussu leikur fer. Vit vita, at kvinnurnar hjá Bermuda eru ótrúliga stinnar, men vit fara so í øllum førum at gera okkara allarbesta, sigur hon.

Sunnudagin sleppa fimleikararnir at venja, og sjálvar kappingarnar eru á skránni mánadagin, mikudagin og fríggjadagin. Fimleikararnir fara síðani til Danmarkar leygardagin, og verða heima aftur sunnudagin 22. juli, vónandi við nógvum heiðursmerkjum í viðførinum.



*Eftir trý góð hál á oyggjaleikum vóru føroysku fimleikararnir ikki við á Rhodos, har fimleikur ikki var á skránni. Men vónir eru um heiðursmerki, nú fimleikaoyggjaleikir verða hildnir á Isle of Man*

*savnsmynd*

## FAKTA

**Føroysku landsliðini**

**Menn**:
Rósing Dam, Fróði Mortensen, Høgni Øster, Gutti Harryson og Øssur D. Eiriksfoss.

**Kvinnur**:
Kristina Toftegaard, Anita Knudsen, Silja Højgaard, Sonja Joensen, Brim H. Hoydal og Elinborg T. Durhuus.